## Hornblástur í Kastrup

Donsku OL-luttakararnir vórðu stórliga fagnaðir, tá teir í gjárkvøldið komu aftur til Danmarkar. Fyrst og fremst vórðu heiðursmerkjavinnararnir heiðraðir, men sum heild hava danir verið sera væl nøgdir við OL-luttøkuna. Og smílini hjá luttakarunum vóru eisini stór, tá teir komu til Kastrup, har hornorkestur tók ímóti, áðrenn leiðin gekk yvir á Hilton, har veitsla varð fyriskipað



## Real vil hava Villa

Spanski EM-toppskjúttin, Davic Villa, sigst nú vera ávegis til Real Madrid. Valencia, har Villa nú spælir, er ikki væl fyri fíggjarliga, og tí er ikki óhugsandi, at teir taka av einum boði úr Real Madrid. Fær Real Madrid hendur á Villa, er sannlíkt, at felagið loyvir brasilska Robinho at fara úr felagnum. Hesir hevur sagt seg vilja sleppa til enska Chelsea

# kum fótbólti





*Geza Turi hjá Víkingi er ein av ikki færri enn fimm útlendskum málverjum í Formula-deildini í ár*

Andras Gango, Predrag Markovic, Marcin Dawid og Vlada Filipovic.

### Teir flestu spæla

Verður hugt nærri at teimum 39 útlendsku nøvnunum í Formuladeildini, so er felags fyri teir flestu, at teir eiga pláss millum teir fyrstu ellivu. Undantøkini eru Predrag Stankovic, sum er næsta val til málverjaplássið í NSÍ, Marcell Balog, sum hevur sitið nógv á beinkinum hjá EB/Streymi, Obele Okeke Onyebuchi og Alin Balutoiu, sum í løtuni mest verða nýttir sum innskiftarar á Skála, meðan Pape Landing Sambou hjá B68 hevur drigist við skaða alt kappingarárið. Somuleiðis er Peter Foldgast hjá EB/Streymi langtíðarskaddur.

Men tað skuldi eisini verið lítil meining í at fáa útlendskar leikarar hendan vegin, um teir ikki styrkja um liðini. Serliga hevur portrið verið trongt hjá teimum ungu í Runavík, har Jann Martin Mortensen og Pól Jóhannus Justinussen eitt nú kendu seg noyddar at skifta til B68 í summarsteðginum.

B36 og EB/Streymur hava fingið minst mál ígjøgnum í hesum kappingarárinum. Felags fyri hesi eru, at tey hava føroyskar málverjar. Á triðja plássinum kemur HB, og har vardi Tróndur Vatnhamar málið stóran part av fyrru helvt.

Rodrigo Silva er tann útlendski leikarin, sum hevur skotið flest mál higartil. Framherjin úr KÍ er tilskrivaður níggju mál, og hevur Arnbjørn Hansen og Andrew av Fløtum framman fyri seg á toppskjúttaralistanum. Tað er tó ikki vanligt aðrastaðni, at útlendingar eru toppskjúttar í ymsu kappingunum. Í løtuni er tað bara í Danmark, har Djiby Fall úr OB hevur skotið flest mál, av norðanlondunum, sum hevur útlendskan toppskjútta.

### Flest úr Serbia

Oftast venda føroysku feløgini seg móti Serbia, tá hesi leita eftir útlendskum leikarum. Árið í ár er einki undantak. Flestu útlendsku leikararnir, sum eru virknir í føroysku fótbóltskappingini í løtuni, eru ættaðir hiðani. Heili 12 av teimum 48 hava Serbia sum tjóðskap.

### Útlendingar í bestu føroysku fótbóltsdeildini í 2008

**07 Vestur:**
Alexandre Da Silva
Braga
Jovan Radinovic-Panic
Andrezej Stretowicz
Piotr Krakowski, venjari

**AB:**
Morten Overgaard
Evrard Blé
Ikechukwu Onyema

**B36:**
Dmitrije Jankovic
Alex José Dos Santos
Sam Malson

**B68:**
Brian Andresen
Vlada Filipovic
Ndende Adama Guéye
Pape Landing Sambou
Ahmed Keita
Badara Diedhiou

**B71:**
Flavio Santana
Wellington Soares
Clayton Soares
Fabio Vieira
Patrick Sunday Okoro

**EB/Streymur:**
Anders Post Jacobsen
Sorin Anghel
Peter Foldgast
Marcell Balog

**HB:**
Marcin Dawid
Milan Kuljic

**ÍF:**
Andras Gango
Alexander Jovevic
Balasz Sinkó
Nenad Saric
Sasa Jovanovic

**KÍ:**
Milic Curcic
Joe Zewe
Rodrigo

**NSÍ:**
Aco Pandurevic
Milan Pejcic
Nenad Stankovic
Karoly Potemkin
Predrag Stankovic

**Skála:**
Predrag Markovic
Valeriu Mieila
Obele Okeke Onyebuchi
Alin Balutoiu

**TB:**
Josef Bassene
Ivan Stojkovic

**VB/Sumba:**
Ongin.

**Víkingur:**
Geza Turi
Zoltán Bukszegi